# Kunngerðablaðið A

2022

Givið út 5. mai 2022

Nr. 62

4. mai 2022

**Kunngerð um broyting í kunngerð um triðjalond, sum hava nøktandi verndarstøði viðvíkjandi flutningi av persónsupplýsingum**
(Suðurkorea við á listan yvir triðjalond, sum hava nøktandi verndarstøði)

**§ 1**

Í kunngerð nr. 175 frá 16. desember 2020 um triðjalond, sum hava nøktandi verndarstøði viðvíkjandi flutningi av persónsupplýsingum, verður skjal 1 orðað sum ásett í skjali 1.

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Løgmansskrivstovan, 4. mai 2022

**Bárður á Steig Nielsen (sign.)**
løgmaður

/ John Rajani (sign.)

**Skjal 1**

**“Skjal 1**

**Triðjalond við nøktandi verndarstøði**

1) Andorra.
2) Argentina.
3) Gibraltar.
4) Guernsey.
5) Isle of Man.
6) Ísrael.
7) Japan.
8) Jersey.
9) Kanada, tó bert um flutningurin er til vinnuligar fyritøkur.
10) Ný Sæland.
11) Sameinda Kongsríkið, t.e. Ongland, Wales, Skotland og Norðurírland.
12) Sveis.
13) Uruguai.
14) Suðurkorea, tó undantikið átrúnaðarligir felagsskapir í tann mun hesir viðgera persónsupplýsingar sum liður í teirra trúboðaravirksemi, politiskir flokkar í tann mun teir viðgera persónsupplýsingar í sambandi við tilnevning av valevnum, og dátuábyrgdarar, ið eru undir eftirliti av the Financial Services Commission viðvíkjandi viðgerð av persónligum kreditupplýsingum sambært the Credit Information Act, í tann mun teir viðgera slíkar upplýsingar.”